# ra, søga og avbjóðing

upprunaliga sá út. Ferðafólk, ið hava áhuga í fornlutum, eiga avgjørt at vitja Heima í Húsi.

Til ber at gera gongutúrar í oynni, og bóndin í oynni er ein sera góður frásøgumaður. Á gongutúrunum hava ferðafólk møguleika at síggja skotsku neytini, ið ganga leys í haganum. Hesi neyt eru heilt øðrvísi enn tey, ið vit annars eru von við at síggja. Harafturat verður gingið fram við fuglabjørgum, íbygdum steinum og kirkjugarðinum, ið liggur langt frá bygdini. Hann var bygdur av tilvild í 1850'unum, tá ein maður mátti jarðast í oynni, av tí at ikki slapst av oynni við líkinum. Kirkjugarðurin hevur ikki verið nýttur síðani í 1950'unum, tá seinasti maðurin var jarðaður har.

Til ber at keypa ein bita frá blíðu bóndahjúnunum, sum borðreiða við heimabakaðum breyði við alskyns føroyskum viðskera. Ein serstakliga góður endi á einum avbera góðum túri.



*Ferðafólk í Koltri hava møguleika at síggja skotsku neytini, ið ganga leys í haganum. Skotsku neytini eru heilt øðrvísi enn tey, sum vit eru von við at síggja her á landi*



















